MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: 8. februar 2011
Tygara ref.:
Máltal: 70-31101/070337 -/124

**Løgtingsmál nr. xx/2010: Uppskot til løgtingslóg um brotingar í løgtingslóg um fólkaskúlan**

**Uppskot**

**til**

**løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um fólkaskúlan**

**§ 1.** Í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

**1)** Í § 4, stk. verður sett sum nýtt stk. 2:
"*Stk. 2.* kommunur ella skúlasambond, sum hava 120 ella fleiri næmingar í 10. flokki, kunnu við góðkenning landsstýrismansins skipa ein felags 10. floks skúla við sjálvstøðugari leiðslu fyri allar 10. floks næmingarnar í kommununi ella skúlasamstarvinum. Landsstýrismaðurin kann í serligum føri víkja frá ásetta næmingtalinum". Stk. 2 verður hereftir stk. 4.

**2)** Í § 4 verður sett nýtt stk. 3:
"*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um at skipa felags 10. floks skúla."
Stk. 2 verður hereftir stk. 4, stk. 3 verður stk. 5, stk. 4 verður stk. 6, stk. 5 verður stk. 7, stk. 6 verður stk. 8, stk. 7 verður stk. 9 og stk. 8 verður hereftir stk. 10.

**3)** Í § 14, stk. 9 verður "royndarlærugreinunum, sbr. § 16, stk. 1-6 lýst við talmetum (støðumetum)" broytt til: "próvtøkulærugreinunum, sbr. § 16, stk. 1 – 8 lýst við talmetum".

**4)** § 16, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Stk. 1. Undirvísingin í 9. og 10. flokki endar við próvtøku í kravdum lærugreinum og vallærugreinum."

**5)** § 16 stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur reglur fyri próvtøkur í 9. og 10. flokki, herímillum um próvtøkulærugreinir, próvtøkukrøv í einstøku lærugreinunum, próvtøkuhald, próvdøming, próvtøl, ársmet, eftirmeting og hvussu próvtøkuskjølini skulu vera."

**6)** § 16, stk. 4 verður strikað. Stk. 5 verður hereftir stk. 4, og stk. 6 verður hereftir stk. 5.

**7)** § 16, stk. 7 verður strikað.

**8)** § 16, stk. 8 verður hereftir stk. 6 og verður orðað soleiðis:
"*Stk 6.* Landsstýrismaðurin setur tær skrivligu próvtøkuuppgávurnar og lærarin setur munnligu próvtøkuuppgávurnar eftir reglum, sum landsstýrismaðurin ásetur."

**9)** § 16, stk. 9 verður hereftir stk. 7 og verður eftir "sbr. tó", sett "stk. 5".



Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

**10)** § 17 stk.1 verður orðað soleiðis:
*"Stk. 1.* Skúli kann gera frávik frá próvtøkureglunum fyri næmingar við serligum tørvi og fyri fremmandamæltar næmingar. Landsstýrismaðurin kann áseta gjøllari reglur hesum viðvíkjandi."

**11)** § 17, stk. 2 verður strikað.

**12)** § 23, stk. 4 verður strikað

**13)** § 30, stk. *3* verður strikað, og stk. 4 verður hereftir stk. 3.

**14)** Í § 32 verður sett sum nýtt stk. 3:
"*Stk 3.* Landsstýrismaðurin kann í samstarvi við kommunurnar skipa samstarv millum 10. flokkar í fleiri kommunum."

**15)** Í § 32 verður sett sum nýtt stk. 4:
*"Stk.4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um samstarvið millum 10. flokkar í fleiri kommunum."

**16)** § 35, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 1.* Til at kunna røkja undirvísingina í fólkaskúlanum skal viðkomandi hava lokið útbúgvingina, sum fólkaskúlalærari á Føroya Læraraskúla, Fróðskaparsetri Føroya ella donskum læraraskúla sbr. stk. 2 – 5 ella aðra læraraútbúgving, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent."

**17)** § 47, stk. 6 verður orðað soleiðis:
*"Stk. 6.* Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. §§ 32, stk.1 og 57, stk. 5."

**18)** § 52 stk. 4 verður orðað soleiðis:
*"Stk. 4.* Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. § 32, stk. 1. Í teimum kommunum, ið hava tvey ella fleiri skúlastýri, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygnað, sbr. § 47, stk. 6."

**19)** Í § 57, stk. 4 verður eftir 1. pkt. Sett sum nýtt 2. pkt.:
"Góðkenningin skal eisini hava atlit at hølistørvinum í kommununi og grannakommunum."

**20)** Í § 57, stk. 10 verður "royndi" broytt til: "royndir".

**21)** Í § 57 verður sett sum nýtt stk. 11:
*"Stk. 11.* Landsstýrismanninum verður heimilað at góðkenna, at kommunur við eini royndar- og menningarskipan skipa skúlasamstarv millum kommunur og í kommunum, ið hava fleiri skúlar, til tess at gera bygnaðarligar royndir at gagnnýta verandi játtan betri til frama fyri næmingar, lærarar og avvarðandi kommunur.

**22)** Í § 57 verður sett sum nýtt stk. 12:
*"Stk. 12.* Játtan, ið verður tøk eftir bygnaðarbroytingarnar sbrt. § 57, stk. 11, verður í mest møguligan mun at nýta til royndar-, menningar- og granskingar-verkætlanir, eftirútbúgving av lærarum og skúlaleiðarum umframt til møguligan meirkostnað hjá kommunum í skúla-samstarvinum." Stk. 11 verður hereftir stk. 13.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Tó fáa ásetingarnar í § 1. nr. 4, 5, 6, 7, 8, 9, 10, 11 og 12 gildi 1. august 2011.



Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

Samanumtikið er høvuðsendamálið við lógaruppskotinum at heimila, at kommunur í eini royndartíð skipa royndar- og menningarvirksemi til tess at gera bygnaðarligar royndir, har skúlasamstarv verður skipað millum kommunur ella í kommunum, ið hava fleiri skúlar. Málið er at gagnnýta verandi játtan betur, samstundis sum kommunurnar í skúlasamstarvinum kunnu varðveita meginpartin av møguligari tøkari játtan, ið verður fingin til vega í skúlasamstarvinum til gagns fyri skúlavirksemið í økinum.

Endamálið við eini tílíkari royndarskipan er ikki at spara, men at leggja lunnar undir ein skilabetri skúlabygnað í kommununi og millum kommunur, og samstundis gagnnýta verandi játtan til frama fyri næmingar, lærarar, skúlaleiðslur og kommunurnar.

Sambært uppskotinum er ætlanin, at eitt betur samskipað skúlavirksemi skal frígeva tímar/játtan til eitt nú royndar- og menningarvirksemi, eftirútbúgving av lærarum og skúlaleiðarum og til at rinda ein møguligan merikostnað hjá kommunum, sum stendst av skúlasamstarvinum.

Avbjóðingin er í longdini, at tímajáttanin verður brúkt skilabetri, so at meira fæst burtur úr verandi játtan til fólkaskúlan. Mentamálaráðið hevur havt samskifti um hetta við stóru kommunurnar Tórshavnar Kommunu, Klaksvíkar Kommunu og Sunda Kommunu. Tað er at vóna, at eisini aðrar kommunur í eini royndartíð, kunnu semjast um at fara undir eitt samstarv fyri at gagnnýta játtanina til skúlar í kommununi/økinum betur.

Fyri at betra møguleikarnar hjá kommununum at skipa ein hóskandi skúlabygnað er skotið upp, at tað ikki longur eru einstøku skúlastýrini, sum gera uppskot til skúlabygnað, men kommunan, og at skúlastýrini fáa sama leiklut, sum tá ið skúlabygging fer fram í kommununi.

Fyri at kunna gera skúlabygnaðini meira liðiligan, er skotið upp at taka av ásetingina um, at ein flokkur ikki kann verða broyttur, eftir at hann er skipaður.

Til tess at tryggja, at skúlabygging verður lagað til ein nýggjan kommunu- og skúlabygnað, verður skotið upp, at í sambandi við góðkenning landsstýrismansins av skúlabygging verður atlit eisini tikið til samlaða hølistørvin í kommununi og grannakommununum.

Heimilað verður at skipa samstarv millum 10. flokkar í fleiri kommunum og eisini í kommunum, sum hava fleiri skúlar.

Kommunur ella skúlasambond, sum hava 120 ella fleiri næmingar í 10. flokki, kunnu við góðkenning landsstýrismansins skipa ein felags 10. floks skúla við sjálvstøðugari leiðslu fyri allar 10. floks næmingarnar í kommununi ella skúlasamstarvinum.

Harumframt er talan um aðrar lógarbroytingar, sum ikki beinleiðis hava við broytingar av verandi skúlabygnaði at gera:



Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

1. Broytingar í ásetingum um próvtøku í 9. og 10. flokki
2. Ásetingin um Landsmiðstøðina verður strikað í lógini, tí Landsmiðstøðin er vorðin partur av samanlagda stovninum Vitanum, sum verður heimilaður í Løgtingslóg nr. 48 frá 9. mai 2005 um útgávu av undirvísingarmiðlum.

Í Ólavsøkupakkanum 2009 varð lagt upp til bygnaðarbroytingar á fólkaskúlaøkinum í sambandi við, at játtanin varð skerd. Landsstýriskvinnan fekk undirtøku í landsstýrinum fyri at gera uppskot til broytingarnar í fólkaskúlalógini, so hon kundi fara undir samráðingar við skúlamyndugleikarnar á staðnum at skipa skúlasambond í skúlaøkjum. Skúlaøkini skuldu vera tey somu sum kommunurnar, tá ið kommunal reformurin verður framdur, og eisini varð skotið upp at strika § 29, stk. 5 um rættin at krevja fólkaatkvøðu í sambandi við at leggja skúlar niður. Uppskotið varð lagt fyri tingið á vári 2010, men vann ikki frama í samgonguni og varð tí tikið aftur. Mótstøða var bæði politiskt og millum kommunurnar um at fara undir at skipa skúlasambond tvørtur um kommunumørk, og tí er uppskotið um, at landsstýriskvinnan fær heimild til at skipa skúlasambond ikki tikið við í hesum lógaruppskoti.

Tímajáttanin til fólkaskúlan er skerd í skúlaárinum 2010/11, og av tí at semja ikki var um at gera bygnaðarbroytingar, hevur verið neyðugt at lækka tímatalið í skúlunum fyri at kunna halda játtanina. Tímar til m.a. eftirútbúgving, vallærugreinir og vikartímar eru munandi skerdir, og tillutaðu tímarnir nærkast lógarásetta minstamarkinum. Henda støða kann ikki halda fram, og tí er er neyðugt, at heimild verður í lógini fyri at gera fyrisitingarligar royndir við atliti at m. a. skúlasamstarvi við bygnaðarbroytingum.

Í verandi skipan verður tímajáttanin býtt til 52 skúlar, harav fleiri smáar skúlar, og hetta ger, at tað er kostnaðarmikið at reka fólkaskúlan, og at tað ikki ber til at veita næmingunum tað lærugreinval og bólkaval, sum fólkaskúlalógin heimilar, og tí fáa nógvir næmingar ikki tey undirvísingartilboð, sum teimum tørvar. Harumframt er ikki møguligt at veita næmingunum bestu fakligu læring í øllum kravdum lærugreinunum, tí við so nógvum smáum skúlum, er trupult at hava fakligan læraraførleika í øllum lærugreinum. Skotið verður tí upp at stimbra kommununum at fara undir at skipa skúlasamstarv við royndar-, menningar- og granskingarverkætlanum, so at tímar verða tøkir í kommununi/økinum til at gera fyrisitingarligar royndir, sum kunnu verða grundarlag undir at menna undirvísing fólkaskúlans í økinum og samstundis at tryggja, at játtanin til fólkaskúlan verður gagnnýtt á besta hátt.

Kommunan avger í hvørjum skúlum í kommununi, undirvíst verður, og hvussu nógvir flokkar verða í einstaka skúlanum. Kommunurnar mugu tí taka stig til at gagnnýta játtanina til skúlarnar betur, soleiðis at eitt samskipað skúlavirksemi kann útvega tímar til annað virksemi so sum eftirútbúgving, bólkaskipan í sambandi við næmingalagaða undirvísing, serundirvísing, lesimenning og at rinda møguligan meirkostnað hjá kommunum í sambandi við skúlasamstarv.



Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Nevnast kann í hesum sambandi, at landsstýrskvinnan hevur sett eitt fólkaskúlaráð, sum m.a. skal ráðgeva landsstýriskvinnuni um royndar-, menningar- og granskingarverkætlanir í sambandi við hesi øki:

1. skúlabygnað og royndarætlanir í sambandi við skúlasamstarv
2. tímabýti og lærugreinaskipan
3. námsfrøðiliga leiðslupartin
4. eftirútbúgvingartørv og skipan
5. sernámsfrøðiliga økið

Skúlin skal menna bæði fakligar førleikar, sosialar førleikar og ikki minst musiskt/kreativar førleikar. Somuleiðis skal skúlin rúma øllum næmingum, har pláss er fyri fjølbroytni og ymiskleika. Umstøður skulu tí vera fyri næmingalagaðari undirvísing, har allir næmingar fáa eitt mennandi skúlatilboð í mun til teirra evni og áhuga. Hetta ber ikki nóg væl til við verandi bygnaði, og tí er neyðugt at seta sjøtul á við at gera eitt miðvíst menningar-, royndar- og granskingararbeiði á hesum øki, soleiðis at vit fáa eina smidligari skipan viðvíkjandi skúlabygnaðinum, og at skúlasamstarv í minsta lagi verður skipað í og millum kommunur, ið hava fáar næmingar.

Samfelagið hevur brúk fyri skapanarevnum, mentanarligari nýhugsan, íverksetaraanda og einum høgum vitanarstøði. Við nógvum smáum skúlaeindum, hava vit ikki nóg góðan møguleika at menna okkara skúlaskipan, og tað er ein meinbogi, tá ið vit vita, hvussu umráðandi holl útbúgving er fyri at menna samfelagið. Ein leið at virka fyri og tryggja, at fólkaskúlin hevur bestu menningarumstøður, er at skipa Føroyar í færri og størri skúlaeindir og at fara undir at gera neyðugar royndarverkætlanir, sum vera grundarlag undir teimum átøkum, sum skulu tryggja næmingum bestu undirvísingarligu tilboð og umstøður.

Avbjóðingin er at fáa undirtøku fyri, at tað í eini kommunu, oyggj ella í einum øki er sera skilagott fyri allar partar, at skúlar samstarva um at skipa flokkarnar øðrvísi, og soleiðis útvega tímar, sum kunnu verða brúktir skynsamari, soleiðis at meira fæst burtur úr somu játtan.

## Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan

Verða bygnaðarboytingar framdar, og royndarskipanir settar í verk við samstarvi millum kommunur og serlig samstarvsskipan fyri 10. flokk, verður ávís sparing í verandi tímajáttan til fólkaskúlarnar, ið ætlandi skal kunna verða brúkt til royndar- og menningarvirksemi, eftirútbúgving, næmingaflutning o.a.



Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

**Fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar**
Útreiðslurnar hjá kommununum til næmingaflutning kunnu hækka í ávísan mun í sambandi við skúlasamstarv millum kommunur, og ætlanin er, at ein møgulig sparing í royndartíðini eisini skal kunnað verða nýtt til at veita stuðul til skúlabarnafluting.

**Umsitingarligar avleiðingar fyri landsmyndugleikar**
Mentamálaráðið fær størri arbeiðsbyrðu í sambandi við at skipa royndar-, menningar- og granskingarverkætlanir.


Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

| | Fyri landið/lands-myndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Ja- fyri næmingar og lærarar | |

**Hoyring**
Lógaruppskotið er sent til hoyringar hjá avvarðandi pørtum, Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum, Foreldrafelagnum Heim og Skúli, Føroya Kommunufelag og Kommunusamskipan Føroya, og er freistin at gera viðmerkingar til lógaruppskotið 21. februar 2011. Skipað verður harumframt fyri felags hoyringarfundi 16. februar 2011. Nærri boð um hoyringarfundin koma seinni.

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1, nr. 1**
Skotið verður upp, at kommunur ella skúlasambond, sum hava felags 10. flokk, kunnu við góðkenning landsstýrismansins skipa sjálvstøðugan 10. floks skúla við egnari leiðslu, um næmingatalið er í minsta lagi 120 næmingar. Landsstýrismaðurin kann í serligum føri víkja frá áetta næmingatalinum.

**Til § 1, nr. 2**



Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Landsstýrismaðurin ger nærri reglur fyri, hvussu 10. floks skúli í kommunum og skúlasambondum verður skipaður.

**Til § 1, nr. 3**
Teknisk broyting.

**Til § 1, nr. 4 og 5**
Talan er um at samanskriva stk. 1 og 2 í § 16, samstundis sum skotið verður upp, at próvtøkulærugreinir og próvtøkuviðurskifti annars verða nærri lýst í kunngerð.

**Til § 1, nr. 6 og 7**
Tekniskar broytingar.

**Til § 1, nr. 8**
Skotið verður upp, at tað bara er lærarin, ið setur munnligu próvtøkuuppgávurnar. Í galdandi áseting er tað lærarin ella próvdómarin, ið setur munnligu próvtøkuuppgávurnar.

**Til § 1, nr. 9**
Tekniskar broytingar.

**Til § 1, nr. 10 og 11**
Ásetingin í § 17, stk. 1 er flutt til § 16, stk. 2 og § 17, stk. 2 verður sostatt § 17, stk. 1. Eisini er "royndarreglunum" broytt til "próvtøkureglunum".

**Til § 1, nr. 12**
Skotið verður upp at strika § 23, stk. 4, av tí at Landsmiðstøðin er partur av nýggja stovninum Vitin, sum fatar um stovnarnar, Føroya Skúlabókagrunn, Landsmiðstøðina fyri undirvísingarambоð og KT-depilin. Landsmiðstøðin verður í staðin heimilað í § 3, stk. 2 í Løgtingslóg nr. 48 frá 9. mai 2005 um útgávu av undirvísingarmiðlum, har ásett er, at landsstýrismaðurin kann áleggja stovninum aðrar uppgávur, sum natúrliga eru knýttar at útgávuvirkseminum.

**Til § 1, nr. 13**
Skotið verður upp at strika § 30 stk. 3, sum snýr seg um, at flokkar ikki kunnu umskipast, tá næmingarnir á fyrsta sinni eru býttir í flokkar. Um so er, at tað av námsfrøðiligum orsøkum ella fíggjarligum ávum er neyðugt at umskipa ein flokk, kann skúlin gera hetta fyrisitingarliga.

**Til § 1, nr. 14**
Skotið verður upp, at landsstýrismaðurin fær heimild í samstarvi við kommunurnar at skipa 10. flokkar í størri eindir, soleiðis at tvær ella fleiri kommunur kunnu hava felags 10. flokk. Her er ikki talan um ein 10. floks skúla, men eitt skipað samstarv millum kommunur um næmingar í 10. flokki. Málið er at skapa størri næmingagrundarlag og harvið fleiri valmøguleikar hjá næmingum í 10. flokki. Næmingar í 10. flokki eru ikki fevndir av undirvísingarskylduni.



Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Kravda undirvísingartímatalið er 28 tímar um vikuna, og allar lærugreinir eru vallærugreinir. Umráðandi er tí at hava eitt ávíst lærugreinatilboð, so at flestu næmingar kunnu fáa fakligar avbjóðingar. Eisini er størri krav til tímajáttan fyri at kunna hava eina vallærugreinaskipan, og í verandi tímabýtisskipan er 10. flokkur tað floksstig, sum fær tillutað flest tímar.

**Til § 1, nr. 15**
Heimilað verður landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um at skipa samstarv millum kommunur um 10. flokk.

**Til § 1, nr. 16**
Lógarbroytingin er gjørd við støði í, at Føroya Læraraskúli er lagdur undir Fróðskaparsetur Føroya, sum er stovnurin, ið skipar fyri fólkaskúlalæraraútbúgving.

Sambært galdandi áseting í § 35, stk. 1 í fólkaskúlalógini er treytin fyri at røkja undirvísingina í fólkaskúlanum, at viðkomandi skal hava lokið útbúgvingina sum fólkaskúlalærari á Føroya Læraraskúla ella donskum læraraskúla, ella hava aðra læraraútbúgving, sum landsstýrismaðurin hevur góðkent. Av tí at Føroya Læraraskúli sambært § 1 stk. 3 í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya saman við Sjúkrarøkrafrøðiskúla Føroya er lagdur saman við Fróðskaparsetri Føroya, verður skotið upp, at læraraútbúgvingin á Fróðskaparsetri Føroya eisini verður fevnd av ásetingini um fólkaskúlalæraraútbúgving.

**Til §1, nr. 17 og 18**
Sambært § 52, stk. 4 í galdandi fólkaskúlalóg skal skúlastýrið gera uppskot um skúlabygnað kommununar og broytingar í honum, og sambært § 47 stk. 6 skal kommunustýrið góðkenna skúlabygnaðin í kommununi, sum síðani sambært § 57 stk. 5 skal góðkennast av landsstýrismanninum.

Skotið verður upp, at broyta § 47, stk. 6 soleiðis, at skúlastýrið viðger skúlabygnaðin í samstarvi við kommunustýrið, ið skal gera uppskot til skúlabygnaðin í kommununi, sum síðani skal góðkennast av landsstýrismanninum sambært § 57, stk. 5. Tessvegna verður skotið upp, at sama mannagongd verður nýtt bæði viðvíkjandi góðkenning av skúlabygnaði og skúlabygging.

**Til § 1, nr. 19**
Sambært galdandi lóg, skal landsstýrismaðurin góðkenna øll byggimál og allar útbyggingar-ætlanir, áseta reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður. Skotið verður upp sum nýtt 2. pkt., at góðkenning landsstýrismansins eisini skal hava atlit til undirvísingartørvin í kommununi og grannakommununum í sambandi við skúlabygging.

**Til § 1, nr. 20**
Rætta stavivillu.

**Til § 1, nr. 21**


Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
(+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Landsstýrismanninum verður heimilað at góðkenna bygnaðarbroytingar, ið hava til endamáls at skipa skúlasamstarv millum kommunur og í kommunum, ið hava fleiri skúlar, til tess at gagnnýta verandi játtan betur.

Í verandi kommunubygnaði eru nógvir smáir skúlar og nógvir smáir flokkar. Sostatt eru møguleikarnir stórir fyri, at kommurnar við lutfalsliga smáum broytingum og samstarvi kunnu skipa so fyri, í samstarvi við Mentamálaráðið og skúlaleiðslurnar, at væl meira fæst burtur úr verandi játtanum til skúlarnar.

**Til § 1, nr. 22**
Broytingarnar viðvíkjandi skúlasamstarvi hava sum endamál at skapa umstøður fyri, at tímajáttanin verður betur gagnnýtt, soleiðis at næmingar í skúlasamstarvinum fáa eitt fjølbroyttari undirvísingartilboð, og at tímar verða tøkir til eftirútbúgving, serlig undirvísingarátøk og at rinda møguligar eykaútreiðslur hjá kommununum til m.a skúlabarnaflutning.

**Til § 2**
Skotið verður upp, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men at ásetingarnar viðvíkjandi próvtøku og Landsmiðstøðini í § 1, nr. 4, 5, 6, 7, 8, 9, 10, 11 og 12 fáa gildi 1. august 2011.

Mentamálaráðið 8. februar 2011

Helena Dam á Neystabø
landsstýriskvinna

/Leivur Harryson



Mentamálaráðið umsitur undirvísingar-, granskingar-, menta- og kirkjumál
Mentamálaráðið • Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☎ (+298) 30 65 00 • (+298) 30 65 55 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo